Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bill Justinussen, løgtingsmaður

Svarari: Uni Rasmussen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Elduvíkarvegurin

Spurningar:

1. Hvat kostar tað landskassanum at tryggja vegin og farleiðina til Elduvíkar eftir ógvusliga skriðulopið nýliga?
2. Hvat kostar tað landskassanum at dagføra alla farleiðina úr Funningsfirði til Elduvíkar?
3. Hvat mælir Landsverk til at gera við Elduvíkarvegin?
4. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrismaðurin við Elduvíkarvegnum?

Viðmerkingar:
Eftir ógvusliga skriðulopið við Elduvíkarvegin leygardagin 26. februar er tímin komin at viðgera Elduvíkarvegin í politisku skipanini. Nú vegurin til Funningsfjarðar verður breiðkaður og dagførdur, verður Elduvíkarvegurin natúrliga næsti fløskuhálsur í hesum øki. Tað hevur leingi verið umrøtt, nær peningur kann verða settur av at dagføra og tryggja farleiðina. 7,65 kilometra langi vegurin er einsporaður og liggur í støðum í brøttum lendi. Tí kann tað tykjast sum ein stórur fíggjarligur biti at fara undir eina fullfíggjaða dagføring við teimum krøvum, sum sett verða ídag. Hinvegin er vegurin einsporaður og tí bíligari samanborin við tvísporaðan veg.

Skriðulopið minnir okkum á týdningin av tryggum farleiðum. Tí er átrokandi at taka politiska støðu til hesa farleið, sum leiðir okkum til eina ta vakrastu náttúruperlu í landinum. Eina perlu, sum ferðafólk hava fingið eyguni upp fyri, og sum tí leggur eyka trýst á, at farleiðin verður dagførd og tryggjað.

Á Løgtingi, 4. mars 2022

Bill Justinussen